# Elin Lindenskov setti Glugga-glæma 2006

**Elin Lindenskov, handarbeiðslærari og býráðslimur í Havn, setti framsýningina Gluggaglæma 2006 í Norðurlanda-húsinum mánadagin**

Tá eg varð biðin at seta hesa framsýningina, sat eg og bíðaði á eini bilverksmiðju, tí okkurt var galið við bili mínum. Eg játtaði beinanvegin, kendi tað sum ein heiður, at skula seta eina so spennandi framsýning, sum hesa.

Nógv er hent síðan fyrsta glæman sást frá Gluggaglæmu.

Gluggaglæma hevur setta dám á Føroysk handverk, list og sniðgeving. Frá siðbundnum heimagjørdum dygdarvørum, til nýmótans sniðgeving og handverk. Fleiri fjølbroyttar sølufram-sýningar, ráðstevnur, kappingar og kanningar um handverk og list, heimasíða og sølubúðir hava verið og eru komnar síðani fyrstu framsýningarnar.

Í ár var eingin Gluggaglæma í Müllers Pakkhúsi - summi saknaðu tað, meðan onnur finna aðrar leiðir. Tað er neyðugt við broytingum um vit ikki skulu standa í stað. Vit mugu menna okkum og koma víðari. Henda framsýning sum letur upp í dag er ein broyting í mun til framsýningarnar undanfarnu ár. Hon hevur verið í Íslandi, undir heitinum Grannaglóðir, sjálv hevði eg ikki møguleika, at vitja í Íslandi, men havi tosa við fólk, sum hava vitja sýningina har. Tað var ikki sørt, at hesi fólk vóru stolt av, at hava vitjað eina føroyska framsýning í útlondum, enntá eina við handverki, list og sniðgeving.

Nakrir av luttakarunum á Gluggaglæmu vóru við á framsýning á ráðhúsiunum í Keypmannahavn fyrr í ár, saman við Íslendingum og Grønlendingum. Tað var gjøgnum heimasíðuna hjá Gluggaglæmu, at tey føroysku handverkini vórðu boðin við.

Fleiri av tykkum ið sýna fram í dag, liva sum handverkarar, listafólk ella sniðgevar, meðan onnur hava tað sum hjávinnu. Tit vita hvussu trupult tað er - aðrar inntøkur mugu til, um tit skulu liva av sølu í Føroyum. Vit kundu ynskt, at tað bar til at liva av handverkinum og tað ber til, men tað krevur nógv av hvørjum einstakum. Ein sølusframsýning sum hendan varpar ljós á tykkum, og vónandi selja tit eisini tykkara vørur.

Eg nevndi í byrjanini, at eg sat og bíðaði á bil-verksmiðjuni, tá ið eg varð spurd, um eg vildi seta hesa framsýningina. Við øðrum orðum sat eg og bíðaði, meðan ein handverkari "ornaði" mín bil. Eg valdi at lata bilin í hendurnar á einum kønum manni, sum dugir at "orna" bilar. Tá ið bilurin er liðugur, gjaldi eg tað, ið tað kostar, og eri sera fegin um, at onkur annar kann gera hetta handverkið fyri meg. Eg gjaldið sjálvandi tað, sum tað kostar, uttan at seta spurnartekin við kostnaðin.

Soleiðis er ikki við øllum handverki. Tit vita hvussu trupult tað er at áseta kostnaðin fyri eina vøru, sum tit hava framleitt - at kostnaðarmeta egnar vørur. Tað er ikki lætt, men tað skal til, um handverkið skal mennast og virðast. Tí hevur m.a. hendan framsýningin stóran týdning fyri tykkum sum handverkarar, listafólk og sniðgevarar.

Framsýningin hevur ikki minst týdning fyri okkum sum áskoðarar, tað er mennandi at uppliva og hyggja at dygdar handverki og list. Tað stimbrar okkara sál, og ikki minst ein slíkan gráan dag sum í dag, er tað deiligt at steðga á eina løtu - bara njóta og taka til okkara.

Eg fari at ynskja tykkum góða eydnu við fram-sýningini og framtíðini.



Elin Lindenskov, handarbeiðslærari á Háskúlanum og býráðslimur í Havn, sum setti framsýningina mánadagin. Í bakgrundini kvinnukroppar, sum Oggi Lamhauge hevur gjørt

# Handverk, l

**Afturvendandi tiltakið Gluggaglæmi læt upp í Norður-landahúsinum mánadagin**

*Lagt til rættis: Rigmor Dam*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Undanfarnu árini hevur framsýningin verið í Müllers Pakkhúsið, har karmurin hevur verið livandi verkstaðir og sølubásar. Í ár hava fyrireikararnar broytt konseptið eitt sindur, so lutirnir í størri mun verða sýndir fram í ljósa og opna umhvørvinum, við greiðari tilskilan til listafólkið, ið sniðgivið hevur. Kortini ber til at keypa lutirnir, ið sýndir verða fram, umframt at samband fæst við ymsu listafólkini.

– Vit á Gluggaglæmu arbeiða fyri at fáa dygdargott føroyskt handverk og listhandverk fram í ljósið, - bæði tað, ið virkað verður í Føroyum, og tað í útheiminum, ið hevur tilknýti til oyggjar okkara, siga tær báðar Randi Sigurðsdóttir Vang og Jónhild Johannessen, sum standa aftan fyri hugtakið Gluggaglæmu.

Tað var Elin Lindenskov, handarbeiðslærari á Háskúlanum og býráðslimur í Havn, sum setti framsýningina í gjár og Sigrið Rasmussen sang trý løg fyri mannfjøldini, ið varð møtt upp til setanina. Framsýningin stendur frammi í Norðurlandahúsinum til 19. november.

Sigrið Rasmussen sang trý løg fyri mannfjøldini, ið varð møtt upp til setanina.



*Maria Mørkøre, tøvari*

**Gluggaglæmi stendur frammi í Norðurlanda-húsinum til 19. november**